umhvørvisstovan

Runavíkar kommuna
Heiðavegur 26
FO 600 Runavík

Argir hin 30. juni 2016
Málsnr.: 16/00283-5
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Ingvard Fjallstein

**Viðvíkjandi: Útfylling millum Oljukaiina og Bátahylin á Bakka; Árinsmeting og góðkenning sambært havumhvørvisverndarlógini**

## Umsókn

Runavíkar kommuna, Eyðun Petersen, sendi hin 19. apríl 2016 umsókn um loyvi at fylla grót út á sjógv á Glyvrum. Í fyrsta umfari er talan um at leggja fyllu út, meðan lidna ætlanin fer at umfata bryggju og atløgusíðu.

Talan er um økið frá verandi bryggju – sonevndu Oljukaiini og inn móti bátahylinum á Bakka á Glyvrum. Ætlanin er at halda fylluna 100 metrar frá bátahylinum og ikki at koma at ósanum við Glyvragógv, sunnanvert bátahylin.

Strekkið frá Oljukaiini inn til bátahylin er um 690 metrar, og tí verður fyllan um 580 metrar long. Breiddin út frá verandi sjóvarmála verður um 130 metrar. Samlaða víddin í sjóvarmálanum verður áleið 75.400 $m^2$. Kommunan ger vart við, at grótfylla longu er løgd ígjøgnum stóran part av fjøruni.

Ein botnlýsing var við umsóknini, men Umhvørvisstovan var í iva um, hvørt metingin av djóra- og plantulívinum var lívfrøðiliga grundað. Runavíkar kommuna var biðin um at vísa á, at so var. Hin 28. juni 2016 fekk Umhvørvisstovan eina nýggja búlendislýsing frá kommununi.

## Málsviðgerð

Eingin mátføst tekning var við umsóknini, men eitt kortklipp, sum vísir hvar ætlanin er at gera útfyllingina. Runavíkar havn hevur havt tíðindastubba um verkætlanina við skitsu av útfyllingini.

Runavíkar kommuna ætlar at víðka havnarlagið frá sokallaðu Oljukaiini og norður móti Bátahylinum á Bakka á Glyvrum, einar 580 metrar norður úr Oljukaiini. Ætlanin er at fylla út á 15 metur dýpi ella umleið 130 metrar úr landi í sjóvarmálanum ella umleið 75.000 $m^2$ av botni.

Í fyrsta umfari er ætlanin at fylla grót út á fjørðin, men tá verkætlanin er liðug, skal útfyllingin hava bryggjuøki við atløgusíðu.

Á kortmynd á kortal.fo sæst, at nakað av grótfyllu er fyri eini tíð síðani lagt út norðanfyri Oljukaiina, einar 250 metrar norður úr Oljukaiini og út á 4-5 metra dýpi, umframt at grót er lagt slakar 180 metrar longur norður ígjøgnum fjøruna.

Økið, har ætlanin er at fylla út, liggur sambært byggisamtykt fyri Runavíkar kommunu frá 26. oktober 2015 innanfyri vinnuøkir fyri Runavík, Saltangará og Glyvrar: D1-D4, sum eru ætlaði til havnarendamál og líknandi vinnuvirki, so sum goymsluhús, veitingarvirksemi, sjóvinnu o.t.

Búlendislýsingin frá 28. juni 2016 fevnir um botnin 580 metrar norður úr Oljukaiini og út á 20 metur dýpi ella umleið 145 metrar úr sjóvarmálanum, svarandi til 84.000 m$^2$. Kanningin fór fram frá 31. mai til 1. juni 2016.

Í høvuðsheitum vísir kanningin, at botntilfarið er blandaður sandur við einstøkum steinum og klettum. Har er botnurin klæddur við brúntara, sum festir seg á harða undirlagið. Einstøk sandeygu eru har brúntarin ikki veksur. Í norðara endanum mót ósanum veksur smærri tari. Á umleið 10 metra dýpi fækkast brúntarin. Klettarnir gerast meira berir, tó vaksa skorpukendar algur og ymisk dýr á teimum, harafturat gerst sandurin fínari.

Kanningin staðfestir 59 djórasløg í 14 høvuðusbólkum, t.d. 17 lindýrasløg, 9 ymsar krabbar, 8 ymsar bustmaðkar og 8 fiskasløg.

Úrslitið av kanningunum vísir, at økið kann lýsast við trimum búlendissløgum (habitatum), sum øll eru rættiliga vanlig í Føroyum. Búlendini verða flokkað sum, "Stórtari við reyðtara á nakað vardum kletti", "Klettar við tindadýrum og skorpukendum algum" og "Infralittoral mórukendur sandur".

Skrásettu búðlendini eru vanlig, bæði á Skálafjørðinum og í Føroyujm yvirhøvur. Ongi sjáldsom dýr ella sjáldsamir tarar vórðu skrásett.

Kommunan kann enn ikki upplýsa, hvat virksemið verður á økinum í framtíðini. Um virksemi verður á økinum, sum krevur umhvørvisgóðkenning sambært kap. 5 í løgtingslóg um umhvørvisverd[1], skal kommunan tryggja, at ætlaða virksemið hevur fingið umhvørvisgóðkenning, áðrenn byggiloyvi verður givið, sambært Kunngerð um kommunala byggimálsviðgerð[2].

**Avgerð**

Út frá hesum metir Umhvørvisstovan ikki, at ætlaða útfyllingin út á sjógv fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvið, og hevur tí, sambært § 21, stk. 4 í løgtingslóg um verju av havumhvørvinum [3]tikið avgerð um, at tað ikki er neyðugt við góðkenning sambært § 21, stk. 1 og tilhoyrandi árinsmeting sambært § 21, stk. 2 í lógini. Sambært §18 í fyrisitingarlógini[4] metir Umhvørvisstovan heldur ikki, at neyðugt er við partshoyring, tá avgerðin gongur kommununi á møti.

Vinarliga

Ingvard Fjallstein, málsviðgeri

[1] Løgtingslóg nr. 134 frá 1988 um umhvørvisverd við seinni broytingum
[2] Kunngerð nr. 57 frá 2001 um kommunala byggimálsviðgerð
[3] Løgtingslóg nr. 59 frá 2005 um verju av havumhvørvinum við seinni broytingum
[4] Løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg

umhvørvisstovan · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Tlf: +298 34 24 00 · Fax: +298 34 24 01· us@us.fo · www.us.fo